# HD í Suðuroy

Ætlanin er at fara undir HD lestur í Suðuroy. Undirvísingin fer fram á Føroya Handilsskúla í Havn og verður sjónvarpað beinleiðis til Suðuroyar (høli á Tvøroyri). Tey lesandi síggja og hoyra, hvat fer fram í undirvísingarhølinum í Havn, og lærarin og tey lesandi í Havn síggja og hoyra tey lesandi á Tvøroyri. Tiltakið verður gjørt í samarbeiði við Toll og Skatt.

HD útbúgvingin tekur 4 ár og er samansett av einum 1. parti og einum 2. parti. Undirvísingin fer fram um kvøldið. HD er ein hægri vinnubúskaparlig útbúgving á universitetsstigi.

Kravið at lesa HD 1. part er, at umsøkjarin hevur eina miðnáms-útbúgving (HH, HT, HF, student, fiskivinnuskúla) og hevur støddfrøði á B-stigi (miðstigi).

**Freistin at tekna seg er 30. august 2000.**

Nærri upplýsingar eru at fáa á skúlanum tlf. 317177. Tiltakið er treytað av nóg góðari undirtøku.

**Føroya Handilsskúli**
Marknagilsvegur 77 • Postsmoga 177 • FO-110 Tórshavn
Tel. 317177 • Fax 313374 • Teldupost: sg@hsh.fo

Sosialurin - 311820

# EB-DAGAR

## 25. - 26. - 27. august 2000

**Ítróttardagarnir byrja fríggjadagin 25.08 niðri á Mølini við hesi skrá:**

**Fríggjadagur 25.08.00**

Kl. 18.30 **Ítróttargudstænasta við Emil Olsen** *á Mølini*
**Triathlon** *av Vátanesi*
**Brotssparkkapping** (Børn og vaksin) *á Mølini*
**Tombola - Hoppiborg - Pylsuvognur v.m.** *á Mølini*
Kl. 21.00 **Barnadiskotek** *í EB-húsinum*
Kl. 23.00 **Ungdómsdiskotek** *í EB-húsinum*

**Leygardagur 26.08.00**

Kl. 09.00 **Fótbóltur:** *Piltar* ............ **EB/Streymur b – B68 b**
**B68 b – KÍ c**
**KÍ c – EB/Streymur b**
Kl. 11.00 **Fótbóltur:** *Smádreingir*.. **EB/Streymur – B36**
Kl. 12.30 **Fótbóltur:** *Piltar*............. **NSÍ a – B71 a**
**B71 a – EB/Streymur a**
**EB/Streymur a – NSÍ a**
Kl. 12.00 **Krokk-kapping** (innleiðandi umfar)
Kl. 14.00 **Kajak** *niðri á Vatni*
Kl. 14.00 **Látrið er opið** (kl. 14.00 til 16.00)
Kl. 15.00 **Fótbóltur:** *2. deild menn* **EB/Streymur – LÍF**
Kl. 17.00 **Fótbóltur:** *Kvinnur* .........**EB/Streymur – AB**
Kl. 18.00 **Barnatombola - Køkutombola - Fiskibrunnur - Matsøla** *í EB-húsinum*
Kl. 18.00 **Skjótibásur - Hamarslag - Hoppiborg - Pylsuvognur** *í Bygdini*
Kl. 19.00 **Krokk-kapping** (finaluumfarið)
Kl. 20.00 **Rulluskoytukapping** *á kaiøkinum*
Teir luttakandi bólkarnir eru: 1. og 2. flokkur og yngri, 3. og 4. flokkur, 5. og 6. flokkur, 7. flokkur og eldri
Kl. 22.00 **Felagssangur á Vaglinum. Edvard í Skorini flytir fram røðu.**
**Meksikansk veðrauppboðsøla** (20 krónur fyri hvørt boðið)
Kl. 23.30 **Dansur** ***við Bjørn Djurhuus band*** *í EB-húsinum*

**Sunnudagur 27.08.00**

Kl. 14.00 **Látrið er opið** (kl. 14.00 til 16.00)
Kl. 16.00 **Kappingar millum foreldur og børn**

**Mánadagur 28.08.00**

Kl. 20.00 **Bingo** *í EB-húsinum*

*Lýsið í* **sosialinum**

**ÚTSØLA Í "MÁLING & GÓLV"**
*sí okkara lýsing á síðu 11*

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
*Sí SVF tekstvarp s. 650*

# Jørð- og betongarbeiði Timburarbeiði

Tilboð ynskist uppá jørð- og betongarbeiði og timburarbeiði.
Arbeiðini umfata um- og nýbygging av eldri húsum miðskeiðis í Havn.

Tilfar og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til tel 355 355 innan 1. sept 2000

**Reklamuhúsið Sansir**
tel 355 355 fax 355 350




# Evnisskeið

**Jørgen Gleerup, lektor, mag. art og granskari innan leiðslumenning og fyriskipanarmentan, Syddansk Universitet, kemur til Føroya at hava evnisskeið undir hesum heiti:**

### Organisationskulturel Udvikling og Forandring

Endamálið við skeiðinum er at geva luttakaranum yvirlit yvir tær fyriskipanamentunarligu (organisatiónskulturellu) broytingar, sum hava eyðkent almennar stovnar og privatar fyritøkur hesi seinastu árini/áratíggjuni.

Útgangsstøðið hjá Jørgen Gleerup er at vísa á, hvussu gongdin er hjá fyritøkum, frá at vera nýbyrjaðar við "ígongdsetanarmentan" og til fyritøkan veksur og tillagar seg nútímans fyriskipanarkrøvum og -háttum (den lærende organisation).

Jørgen Gleerup kortleggur eisini, hví nógv menningararbeiði á fyritøkum verður blokerað av, at teir ymisku starvsfólkabólkarnir, fólk á ymiskum deildum og ymsum leiðslustøði hava ymsar hugsanir um, **hvar** tey flóta í menningini.

Fyriskipanarligar kulturmyndir kunna nýtast til at **greiða** sjálvsfatanina av organisatiónini, og Jørgen Gleerup nýtir hesar til at skapa samljóð, sum hevur við sær virkni/effektivitet í menningargongdini á fyritøkuni - og hetta er júst avbjóðingin hjá flestu fyritøkum í dag.

Jørgen Gleerup hevur granskað í leiðslumenning og fyriskipanarmentan í nógv ár, og hevur nógvar væleydnaðar praktiskar royndir við sínum arbeiði sum ráðgevi og "afklarer" hjá leiðslum í menningini av teirra fyritøku.

**Tíð:** 07. septembember 2000 kl. 14.00-20.00
**Stað:** Hotel Føroyar. Bjóða verður:
Kaffi við heimabakaðum køkum
Døgurði við tveimum rættum og onkrum leskandi afturvið
Kaffi við smákøkum
**Tilmelding:** **Føroya Handilsskúli**, Marknagilsvegur 177, Fo-100 Tórshavn
Kontaktpersónur: Ritva Samuelsen,
T-postur:rs@hsh.fo
**Freist:** 01. september 2000
**Kostnaður:** kr. 1550.-
**Málbólkur:** Topleiðsla, millumleiðsla, komandi leiðarar og annars øll, sum hava áhuga í nútímans leiðslu.

**LeiðsluMenningarBólkurin**
**FØROYA HANDILSSKÚLI**



## Skótalið Frelsunarhersins

Vit byrja aftur mánadagin 28. august.
Kl. 17.00–18.30.
Allar gentur og dreingir eru vælkomin við.
Nýggir limir kunnu tekna seg.

**Hevur tú hug at verða skóti**

Smáskótar 1. – 4. flokk
Skótar 5. – 9. flokk
Rovarar frá 16 ár
**Tórsgøta 19, Tórshavn**

## Vaskifólk til Mýrifípuna

Vit søkja eftir dugnaligum vaskifólki 10 tímar um vikuna at byrja 1. sept.

Tann, ið søkir, skal eisini vera avloysari á stovninum. Nærri fæst at vita við at tosa við leiðaran.

**Dagstovnurin Mýrifípan**
826 Trongisvágur
Tlf. 372700

## Mín jólabók 2000

Sóknast verður eftir upprunaføroyskum og týddum søgum, yrkingum o.ø. til Mína jólabók 2000.

Seinasta freist at senda inn tilfar er 25. september 2000.

**Bókadeild Føroya Lærarafelags**
Pedda við Stein gøtu 9 · 100 Tórshavn
Tlf. 317644 · Fax 319644
e-postur: blf@post.olivant.fo

## Reingerðarfólk

Søkt verður eftir royndum fólki til reingerð at byrja beinanvegin. Ringið leygardagin ímillum 9 og 16 á tlf. 211312.

**Vaskarí og Reingerðing**
Dalatún 6 · Tórshavn

## Frá 1000 ára haldinum

Sunnudagin 27. august kl. 16.00 heldur Johs. Andr. Næs fyrilestur um kristniundirvísing í skúlaverkinum í kirkjuni í Hósvík.

**FØROYAR KRISTNAR Í 1000 ÁR**
Postboks 1121 · tlf. +298 321132 · fax +298 321761 · FO-110 Tórshavn
1000

## Søkt verður eftir

álítandi manni til sjálvstøðugt arbeiði at byrja beinanvegin.

Umsøkjarin skal hava koyrikort.

**Skorsteinssóparin**
Hvalvík · Tlf. 422456

# Skeið í innaneftirliti

Skipað verður fyri skeiði í innaneftirliti. Skeiðið er í trimum eindum. Til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar. Pláss er fyri 20 luttakarum á hvørjari eind.

**Eind 1:** **Heilsufrøðilig viðurskifti** **18., 19. og 20. september 2000**
**Eind 2:** **HACCP** **2., 3. og 4. oktober 2000**
**Eind 3:** **Íverksetan og viðlíkahald av innaneftirlitinum** **16., 17. og 18. oktober 2000**

**Málbólkur:** Stjórar, góðskuleiðarar og starvsfólk, ið saman við góðskuleiðaranum hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðinum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

**Undirvísarar:** Serfrøðingar í innaneftirliti

**Stað:** Hotel Føroyar í Havn, allar dagar kl. 9.00 - 16.00

**Skeiðskostnaður:** Kr. 3.500 fyri hvørja eind (verður kravt inn undan skeiðinum)

**Próvtøka:** Skipað verður fyri próvtøku í øllum trimum eindunum eftir lokið skeið

Frálæran fevnir m.a. um:

Smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Freistin at boða frá luttøku er **8. september 2000.** Tilmelding fer fram við at senda ella faxa innskrivingarseðilin til Hotel Føroyar, við Oyggjarvegin, 100 Tórshavn. Telefax nummarið er 316019. Til ber eisini at ringja til Hotel Føroyar tlf. 317500 og boða frá luttøku. **Tilmeldingin er bindandi**. Skeiðið er treytað av nóg stórari undirtøku.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96, 350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73 • Fax. 42 44 28

**Innskrivingarseðil til skeið í innaneftirliti**

**Eind 1:** __ Set kross **Eind 2:** __ Set kross **Eind 3:** __ Set kross

| | |
|---|---|
| Eftirnavn: | Føðingardagur: |
| Fornavn: | Starv/Arbeiðspláss: |
| Gøta: | Tlf. arbeiði: |
| Postnr./stað: | Tlf. heima: |
| Teldupostur: | Gjaldari: |

# KUNNINGARFUNDUR UM E-BUSINESS

## fríggjadagin 1. september 2000 kl. 13.00 til uml. kl. 17.15 á Hotel Føroyum

Heimasíðu og teldupost kenna tey flestu í dag; men hetta er bert ein lítil partur av teim møguleikum, sum fylgja við alnetinum og tí elektronisku handilsverðini í dag og í framtíðini. So ella so eru møguleikarnir viðkomandi fyri allar fyritøkur, sum vilja tryggja sær framtíðar kappingarføri. Felagsheitið fyri hesar møguleikar er "e-business" - sum leiðslan á einstøku fyritøkum eigur at taka støðu til.

TK-Stovan skipar fyri kunningarfundi um e-business undir heitinum **"E-business – viðkemur øllum fyritøkum"**.
Kunningarfundurin er í tveimum pørtum. Í fyrra partinum verður framløga um e-business í síni heild, og seinna partinum eru fýra styttri innlegg um meira ítøkilig evnir, sum eru partur av e-business.

***Skráin verður í høvuðsheitum hendan:***

**13.00** TK-Stovan bjóðar vælkomin

**13.10** Fokus på digitalisering og e-business v/ Jesper Bove-Nielsen

**14.45** Steðgur

**15.00** Hvat kann gerast fyri at fyrireika og ráðgeva fyritøkum, um e-business (t.d. e-handil, e-marknaðarføring, e-keyp, e-distributión v.m.) v/Preben Bach, TIC ráðgeva í Århus amt

**15.30** E-business í Føroyum í dag. Ein lýsing av, hvørjir møguleikar eru í Føroyum í dag, og hvat vit kunnu vænta í næstum. v/ Niels Chr. Nolsøe, stjóra á Elektron

**16.00** Eimskip: Visión og málsetningar um e-business. Hvussu nýtir Eimskip hesa nýggju tøknina, og hvussu fara viðskiftafólk at merkja e-business? v/ Linda Gunnlaugsdóttir, stjóra á Eimskip Føroyar

**16.30** Greitt verður frá tí partinum av e-handli, sum fevnir um flutning av kunning og peningi. Dentur verður lagdur á at greiða frá, hvat skal til, tá ið slíkar loysnir skulu fremjast, bæði av útvegara og keypara. Komið verður stutt inn á tekniska partin og kostnaðarstøðið. v/ Fróða Magnussen, deildarleiðara á Formula.fo

**17.00** Møguleiki at seta spurningar til allar fyrilestrahaldararnar.

**Tilmelding: TK-Stovan, fax 31 93 63 tel. 31 73 66 ella teldupost: tk@tk.fo**
**Kostnaður: Kr. 400,00 u/ MVG.**
**Tilmelding í seinasta lagi týsdagin tann 29/8-2000 áðrenn kl. 12.00.**
**Tilmeldingin er bindandi.**

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37
100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820

**Kunningarfundur um E-business**

Virkisnavn:..........................................................Tal av luttakarum:.....................
Bústaður:..........................................................................................................
Tel.:.......................................................Fax.:.......................................................